StÍF-VÍF 20-20 (12-11)

# Sóley bjargaði øðrum stiginum

**Mest sum alla tíðina var tað StÍF, sum var omaná, men seinastu tíggju minuttirnar slerdi Sóley Mikkelsen torbona til, soleiðis at meistararnir hóast alt fingu eitt stig við sær heim**

KVINNUHONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Í upptakt okkara til hondbóltsvikuskiftið skrivaðu vit, at einki var at taka seg aftur í, at VÍF var stórfavorittur at vinna dystin á Skála móti StÍF. Seinastu vikurnar hevur pílurin hjá verjandi meistarunum nevnliga peiggjað beint uppeftir, meðan tær av álvara hava funnið meistaraspælið fram, og hinvegin hevur tað gingið beint øvugt hjá StÍF, eftir at tær eitt skifti annars høvdu verið á øðrum plássinum á stigatalvuni.

## Treiskaðust

Kanska var tað eisini júst hetta, sum mól í høvdunum hjá VÍF, tá tær sunnudagin fóru á Skála. Nevnliga at talan í veruleikanum átti at verið um avgreiðsluspurning, men tað var sjónligt, at hetta ikki var tað sama, sum StÍF ætlaði.

Frá fyrsta bríksli tóktist nevnliga greitt, at júst hendan dystin ætlaði StÍF sær at nýta til at koma úr aftur naggatódnini hjá liðnum, og fyrstu løtuna royndu tær eisini at seta ferð á, til tess at geva gestunum ein hvøkk.

Hetta var tó um at gera av við StÍF, longu áðrenn dysturin veruliga var komin ígongd. Í royndunum at flyta bóltin skjótt sínamillum komu fleiri óneyðug bólttap, og móti VÍF er hetta ikki nakað, sum mann ger órevsaður. Við nøkrum málum á rað kom mest sum alt fyri eitt munur ímillum liðini, og so skuldi ein kanska hildið, at nú var liðugt hjá heimaliðnum.

Tær góvust tó ongantíð heilt at stríðast. Ikki minst tóktist Asta Petrauskiene at vera sera væl fyri, og tá VÍF samstundis ansaði ov lítið eftir skotmøguleikum hennara, fekk hon við jøvnum millumbilum høgt bóltarnar framvið verjuleikarunum uttan nakran hjá møguleika hjá Manuelu Stan at verja fyri.

Og so við og við mentust hinar á liðnum hjá StÍF eisini. Talan er í nógvum førum um evnaríkar ungar leikarar, sum uttan iva fara at seta dám á føroyskan hondbólt í komandi árunum, men enn restar neyðugi stabiliteturin kanska í hjá teimum. Sunnudagin vóru tær tó fyri tað mesta á aldukambinum, og tó at VÍF til tíðir royndi at toga seg uppaftur, so var hetta ikki bara sum at siga tað.

Stóri trupulleikin hjá VÍF var kanska eisini, at tær als ikki høvdu neyðuga tolið, sum skal til í einum hondbóltsdysti. Fleiri ferðir vóru vunnir bóltar tveittir burtur, tí hugurin at fara í skjót mótálop var ov stórur, og í nógvum førum vóru skotroyndir bæði skundaðar og illa umhugsaðar. Og so stóð Kristina Griksaite eisini framúr dyst í StÍF málinum, soleiðis at hon kundi taka sær av fleiri av møguleikunum, sum VÍF hóast alt fekk.



*Asta Petrauskiene var mest sum flúgvandi ímóti VÍF, tá hon ferð eftir ferð hamraði bóltarnar inn um Manuelu Stan í VÍF-málinum*

*Mydn: Álvur Haraldsen*

## Seinasti skotið mundi avgjørt

Undan steðginum hevði StÍF soleiðis vunnið seg fram um VÍF, og fyrstu løtuna av seinna hálvleiki vóru eingi líkindi til, at hetta skuldi broytast. Yvirhøvur tóktist tað so, at støðan als ikki skuldi broytast, tí tað gingu nærum 10 minuttir, áðrenn fyrsta málið eftir steðgin kom.

Hetta fekk stÍF, og spakuliga tóku tær at draga alt longur frá VÍF. Við umhugsni og tolsemi fingu tær eitt alsamt betri tak á dystin, og so við og við fingu áskoðararnir varhugan av, at her vendist ikki hjá VÍF. At venjararnir so eisini valdu at taka fleiri av vanligu lyklaleikarunum út, tóktist ikki gera støðuna betri, men kanska var tað hinvegin júst hetta, sum skuldi til.

Seinastu tíggju minuttirnar var nevnliga viðvent í holuni. VÍF hevði bert fingið tvey mál fyrstu 20 minuttirnar eftir steðgin, men við eini nú hvíldari Sóley Mikkelsen á vøllinum, kom annað skil á. Skálakvinnan hjá VÍF bæði spældi og avsluttaði upp til sítt besta, og skjótt tók munurin at minka.

Ein útvísing til StÍF gjørdist helst eisini sítt, og brádliga hevði VÍF togað seg upp á javnt. Ein minutt fyri leiklok vóru tær enntá frammanfyri. Beint eftir at hava skotið 20. VÍF málið varð Nicoleta Radu tó rikin av vøllinum, og soleiðis kundi StÍF fara í seinasta álopið við einum leikara í yvirtali. Og tað eydnaðist eisini at skora, tá bólturin varð tveittur út á veingin, har Anna B. Danielsen sendi í gólvið og upp undir nettakið.

Og so var eisini um reppið, at StÍF vann dystin. Í seinastu royndini at fáa mál, fór Manuela Stan eisini við í álop, og tá bólturin varð mistu, hevði Asta Petrauskiene opið mál at skjóta eftir, men tíverri fyri hana og StÍF, so fór skotið beint við síðuna av.

## Broytti lítið á talvuni

Hóast tað neyvan hóskaði VÍF serliga væl, at tær soleiðis skuldu vera fyri stigamissi, so broytti úrslitið ikki stórvegis í oddinum á stigatalvuni. VÍF er nú í kraft av betri málmuni frammanfyri VB á talvuni, tó at VB hevur ein dyst tilgóðar.

Tað er tó einki at ivast í, at sum støðan er í løtuni, so skal VÍF vinna dystirnar á VB, um meistaraheitið skal varðveitast í bygdini, so har er einki broytt sum so.

Hjá StÍF broyttist kanska heldur ikki so nógv á stigatalvuni. Men lítið er at ivast í, at sjálvsvirðingin fekk eitt stórt kvink uppeftir, nú tær fyri aðru ferð í ár tóku stig frá VÍF. Hvat hetta kann koma at merkja fyri kappingina, er ilt at meta um, men í grundspælinum byrjaði upptúrurin hjá liðnum eftir sigurin á VÍF. Og tí er kanska væl hugsandi, at StÍF nú aftur fer at gera um seg.

### Dysturin í tølum

**Málskjúttar:**

StÍF: Asta Petrauskiene 11(4), Poula D. Olsen 4, Anna B. Danielsen 2, Guðrun Ólavsdóttir 1, Alina Olaru 1, Anna Maria Berthelsen 1

VÍF: Sóley Mikkelsen 7(3), Nicoleta Radu 7, Fríða Marjunardóttir 2, Jacklin Durhuus 2, Alis Høghamar 1

Brotskøst: StÍF 5, VÍF 3

Útvísingar: StÍF 2, VÍF 2

Dómarar úr Tjaldri: Kári Hansen & Trygvi Mortensen: Høvdu alla tíðina gott tak á.



# A-landsliðið fer við pengunum

**Altjóða avbjóðingarnar hjá yngru landsliðunum fækka, nú A-landsliðið hjá monnum er vorðið veruleiki**

HONDBÓLTS-LANDSLIÐ
*Jákup Mørk*

Tað vóru mong, sum fegnaðust, tá HSF fyri trimum árum síðani kunngjørdi, at nú skuldi ferð aftur setast á A-landsliðini hjá monnum og kvinnum. Ein partur av ítøkiliga úrslitinum av hesum var at síggja nú í januar mánaði, tá A-landsliðið hjá monnum fýra ferðir á rað spældi EM-undankappingardyst fyri fullsettari høll.

Ein onnur ítøkilig avleiðing – sum ikki hevur fingið eins nógva umrøðu – er, at Hondbóltssambandinum tørvar munandi størri peningaupphæddir, um alt landsliðsarbeiðið skal koyra.



*Ungdómslandsliðini hava seinastu átta árini verið hornasteinarnir í landsliðsaktivitetinum hjá HSF, men í ár verða avbjóðingarnar hjá hesum millum lítlar og ongar*

## Feløgini fíggjaðu

Arbeiðið við landsliðnum byrjaði tó afturi í 1993, tá nýggja nevndin í HSF setti sær fyri, spakuliga at byggja landsliðsaktivitetin upp. Tað varð hildið at vera skilabest, um arbeiðið tá byrjaði við yngru landsliðunum, soleiðis at vit eftir ávísum áramáli høvdu fleiri leikarar, sum høvdu verið í landsliðsskipanini frá ungum árum, og sum tískil høvdu betri fortreytir at standa seg, tá krevjandi uppgávurnar við A-landsliðunum stóðu fyri framman.

Pengar skuldu sjálvandi til, og fyri at fíggja hendan aktivitetin varð samstarv fingið í lag við feløgini. Hetta varð skipað so, at fyri hvørt atgongumerkið, sum selt varð til landskappingardystirnar, fekk HSF 10 krónur. Hartil rindaðu feløgini eitt ávíst gjald fyri hvønn landsliðsleikara, sum tey høvdu. Allir peningurin, sum HSF fekk á hendan hátt, varð oyramerktur til arbeiðið við yngru landsliðunum.

Tá veddingarpengarnir frá Dansk Tipstjeneste komu nøkur ár seinni, varð somuleiðis avrátt, at eisini hendan upphæddin skuldi oyramerkjast til ungdómslandsliðini, soleiðis at hesi nú høvdu eitt enn tryggari grundarlag at standa á. Um sama mundið varð so eisini avrátt at fara í holt við A-landsliðini. Til at fíggja hendan partin varð serstakur stuðulsbólkur settur á stovn, og umframt tær sponsoravtalur, sum gjørdar vórðu kring landsliðsarbeiðið, vórðu eisini gjørdar sponsoravtalur við Føroya Tele og Poul Hansen um at verða høvuðsstuðlar fyri ávíkavist lands- og steypakapping. Tað vil við øðrum orðum siga, at pengarnir frá atgongumerkjum, gjaldið frá feløgunum og veddingarpengarnir frá Dansk Tipstjeneste framvegis vóru ætlaðir ungdómslandsliðnum.

## Samtyktirnar broyttar

Hetta var eisini veruleikin fram til seinasta aðalfundin hjá HSF. Men eftir øllum at døma hevur ikki gingist nóg væl at fáa pening inn til A-landsliðið. Í øllum førum vórðu samtyktirnar tá broyttar soleiðis, at pengarnir frá atgongumerkjum, feløgum og ítróttarvedding ikki longur eru oyramerktir til yngru landsliðini, men ístaðin til landsliðsarbeiðið sum heild.

- Tað er rætt, at viðtøkurnar vórðu broyttar á seinasta aðalfundi, soleiðis at nevndin í HSF nú hevur størri rásarúm, tá gerast skal av, hvussu pengarnir skulu nýtast, sigur Petur Ove Petersen, formaður í HSF.

Hinvegin heldur formaðurin tað ikki vera rætt, tá sagt verður, at hetta fer at raka aktivitetin við yngru landsliðunum.

- Vit gjørdu av at minka nakað um hendan partin, og tó at minkingina var nakað størri, enn vit ætlaðu, so hava vit als ikki slept hesum partinum. Talan verður tó helst ikki um undankappingardystir, men ætlanin er, at yngru landsliðini skulu sleppa við til millumtjóða kappingar av ymsum slag. Eitt nú eru fleiri slíkar kappingar í Danmark og Svøríki, har tað eisini er vanligt, at onnur ungdómslandslið taka lut. Soleiðis slepst helst undan, at vit eitt nú skulu ferðast til Hvítarusslands fyri at fáa bank frá heimsmeistarunum, og tí átti hetta bæði ítróttarliga og fíggjarliga at verið ein fyrimunur, heldur altso Petur Ove Petersen.

Petur Ove viðgongur tó, at tað neyvan verður í ár, at hesar avbjóðingarnar verða. Fyrst og fremst sigur hann, at tey nú skulu gera eina eftirmeting av, hvussu undankappingin hjá manslandsliðnum hilnaðist, og síðani verður gjørt av, hvussu hinir partarnar av landsliðsarbeiðinum skulu skipast.

Neistin-VB 15-19 (5-8):

# VB nærkast steypafinaluni

**Fyrra hálvfinalan endaði við sigri á útivølli, og við fýra málum í rygginum, er ilt at ímynda sær, at VB ikki skal vinna fram til finaluna**

COCA-COLA KAPPINGIN KVINNUR

Fyrsti av teimum fýra hálvfinaludystunum í Coca-cola kappingini hjá kvinnum stóð á skránni, tá VB vitjaði í Havn leygardagin. Mett eftir úrslitunum í ár, so var einki at ivast í, at VB vóru favorittar at vinna dystin, og hendan metingin vísti seg eisini at halda.

Tó at spælið langt ífrá var so málsøkið, sum tað fleiri ferðir hevur verið í ár, so var tað fyri tað mesta so, at VB hevði munin. Verður sæð burtur frá fyrstu 10 minuttunum, so hildu teir alla tíðina Neistanum í stuttum tjóðri, og tað, sum verjan ikki megnaði at byrgja fyri, endaði aloftast hjá væl leikandi Daiva Ylaite í málinum.

Og tó at álopsparturin ikki gekk so væl, sum hann oftani hevur gjørt, so hevur VB her tvær av bestu individualistunum í landinum, og hesum báðum megnaði Neistin ongan tíð at halda.

Við sigrinum er lítið at ivast í, at VB hevur meira enn annan fótin í steypafinaluni, sum so verður teirra triðja í fýra ár. Við fýra málum umframt fyrimuninum av heimavølli í seinna dystinum er í øllum førum ilt at fáa eyga á, hvussu tær skulu missa móti Neistanum. Ikki minst, tá havt verður í huga gongdin hjá liðunum báðum í landskappingini, har Neistin í løtuni tykist skrambla fullkomuliga saman, meðan VB hinvegin heldur rimmarfast í oddastríðnum.

### Dysturin í tølum

**Neistin-VB 15-19 (5-8)**

Málskjúttar:

Neistin: Súna Mørk 6(3), Christina Holm 2, Lív Sørensen 2, Anna Clementsen 2, Ása á Neystabø 1, Rakul Augustinussen 1, Simona Dziugyte 1(1)

VB: Reda Kurkaskiene 8(1), Rannvá Augustinussen 5, Daiva Tomaite 3(2), Eyðdis Kjærbo 1, Arnleyð Hjelm 1, Eyðbritt Krosslá 1, Laila Jespersen 1

Brotskøst: Neistin 6, VB 5

Utvísingar: Neistin 1, VB 3

Dómarar úr Kyndli: Ragnar Simonsen & Rúni Mohr